STUTT SAGT

## Irakar ikki samdir enn

Teir iraksku politikararnir, sum loksins eru vorðnir samdir um at skipa stjórn, eru á einum máli um, at tað týdningarmesta málið júst nú er at fáa enda á ófriðinum, men teir kunnu ikki semjast um, hvør skal hava ábyrgdina av trygdini.

Ósemjan ímillum flokkarnar ger, at landið hevur framvegis ikki fingið nakran ráðharra í trygdarmálum. Vælvitandi keldur siga við Reuter, at innast inni hava ráðharrarnir úr teimum ymsu flokkunum ikki fult álit á hvør øðrum, og tað ger, at teir aftra seg við at lata ein ávísan ráðharra umsita trygdarmálini, tí tað verður í stóran mun hann, sum ger av, hvørjir irakar kunnu bera vápn. Tað eru serliga sunnimuslimarnir, sum eru ímóti at lata ein shiamuslim umsita trygdarmál, tí teir bera ótta fyri, at hann fer at geva shiamuslimskum bólkum loyvi at bera vápn.

Amerikanskir talsmenn hava sagt, at nú Irak hevur fingið eina stjórn, kunnu irakar og amerikanarar tosa um, nær USA skal fara undir at taka sínar hermenn heimaftur, men eygleiðarar siga, at tað er púra burturvið at tosa um afturtøku, so leingi irakar ikki kunnu semjast innanhýsis.

## Sita dómin heima

Eysturríki, sum hevur formansskapin í ES í løtuni, arbeiðir við at fáa londini at samtykkja eina skipan, sum skal bera í sær, at ES-borgarar, sum verða dømdir fyri lógarbrot í einum av limalondunum, skulu hava rætt til at sita dómin í heimlandinum, vilja teir tað.

Úr Bruxelles verður sagt, at ES-londini taka undir við prinsippinum í eysturríksku uppskotinum, men at summi lond ivast, tí tað er munur á revsilógini frá einum landi til annað. Tað merkir millum annað, at er ein persónur dømdur fongsulsrevsing fyri eitt lógarbrot, sum ikki gevur fongsulsrevsing í heimlandi hansara, kann hann ikki latast heimlandinum.

Herfyri samdust ES-londini um at gera eina avtalu við Noreg og Ísland um at flýggja hvør øðrum fólk, sum eru skuldsett ella undir illgruna fyri okkurt brotsverk. Tað ber millum annað í sær, at eydnast tað einum skuldsettum íslendingi at flýggja úr Íslandi til okkurt av ES-londunum, kann hann sendast aftur til Íslands, so hann hann koma fyri rættin har.

## Haider frá

Tann umstríddi eysturríkski politikarin Jörg Haider hevur lagt frá sær sum formaður í flokkinum BZÖ, sum hann stovnaði í fjør.

Haider var fyrr formaður í Frælsisflokkinum, men noyddist at fara frá eftir innanhýsis ósemju. Síðani hevur hann roynt at leggja sjógv ímillum BZÖ og tey víðgongdu sjónarmiðini hjá Frælsisflokkinum, men tað tykist ikki hava borið frukt. Í hvussu er vísir ein nýggj meiningakanning, at bara trý prosent av veljarunum styðja flokkin, og tað fekk Haider at leggja frá sær umvikuskiftið.

## Statoil til Irak

Ikki færri enn 40 altjóða feløg eru til reiðar at fara til Irak fyri at fáa lut í landsins oljuvinnu, men feløgini noyðast at bíða, til iraksku politikararnir hava samtykt eina nýggja lóg um oljuvinnu, skrivar Aftenposten.

Higartil hava kanningar avdúkað, at Irak hevur meiri enn 100 milliardir tunnur av olju í undirgrundini, men tað er ikki óhugsandi, at tann veruliga nøgdin er tvær ferðir so stór. Tey seinastu nógvu árini hava kríggj og ófriður darvað iraksku oljuvinnuni, men nú er líkt til, at vinnan kann fáa frið at virka. Tí er tann útlendski áhugin so stórur, skrivar Dagsavisen.

Statoil skrivaði longu í oktober í fjør undir eina samstarvsavtalu við myndugleikarnar í Bagdad. Í fyrsta lagi ætlar Statoil at dúva upp á verandi olju- og gassleiðir við at útvinna einar 100.000 tunnur av olju um dagin, men felagið fer møguliga eisini at leita eftir nýggjum leiðum.

UTTAN ÚR HEIMI

# Burturflytarar hava fingið 300 mió. í loysigjaldi




*Hesir báðir týskararnir vórðu burturfluttir í Irak í mars. Sambært The Times rindaði Týskland loysigjald fyri at fáa teir leysar*

**Fleiri lond hava goldið irakskum burturflytarum nógvar pengar í loysigjaldi fyri at fáa teir at lata gíslar leysar**

LOYSIGJALD
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein altjóða sáttmáli sigur, at lond eiga ikki at rinda loysigjald fyri fólk, sum verða burturflutt, men sambært bretska blaðnum The Times skulu burturflytararnir bara leggja seg eftir at ræna fólk úr teimum røttu londunum, tí so kunnu teir vera rættiliga vísir í at fáa væl av pengum burturúr.

Eftir øllum at døma loysir tað seg serliga væl at burturflyta týskar, franskar og italskar ríkisborgarar, tí sambært The Times hava tey trý londini goldið burturflytarum í Irak 250 milliónir krónur í loysigjaldi, sjálvt um stjórnirnar í teimum trimum londunum avsanna tað.

Eftir teimum upplýsingum, sum blaðið hevur fingið fatur á, hevur Frakland goldið 146 milliónir krónur fyri tríggjar franskar ríkisborgarar, Italia 64 milliónir fyri tveir av sínum borgarum og Týskland 47 milliónir fyri tríggjar av sínum. Prísurin fyri hvønn gísla hevur ligið ímillum 14 og 58 milliónir krónur, skrivar blaðið.

Vesturlendskir diplomatar ilskast inn á stjórnirnar í París, Berlin og Rom, tí teir halda, at tær eru alt ov skjótar at slaka, og at tað hevur eggjað yvirgangsmonnum í Irak til at ræna vesturlendingar.

– Á pappírinum standa vit saman, men tað er líkt til, at nakrar stjórnir hava goldið loysiogjald, sigur ein týðandi diplomatur við The Times.

Sambært blaðnum er eisini illgruni um, at Svøríki, Jordan, Turkaland og Rumenia hava goldið loysigjald fyri gíslar í Irak.

# Biskupur í bøn fyri Tom Hanks

**Leiðarin í katólska felagsskapinum Opus Dei biður fyri Tom Hanks og hinum leikarunum í filminum „Da Vinci Gátan“**



*Leiðarin hjá Opus Dei sigur seg biðja fyri Tom Hanks hvønn einasta dag*

DA VINCI GÁTAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Javier Echevarria Rodriguez, biskupur, leggur Tom Hanks og hinar leikararnar í filminum undir guðsspottan, og tí er hann farin at biðja fyri teimum og høvundinum Dan Brown, sum hevur skrivað bókina um Da Vinci-gátuna.

Biskupurin viðgongur, at hann hevur ikki lisið ta nógv umrøddu bókina, og at hann hevur heldur ikki sæð filmin. Kortini er hann sera harmur um ta mynd, sum bókin og filmurin geva av Opus Dei, og eftir hansara áskoðan er tað neyðugt at biðja fyri Tom Hanks og hinum leikarunum.

– Eg biði fyri Dan Brown hvønn einasta dag og eisini fyri teimum, sum hava gjørt filmin, sigur Javier Echevarria Rodriguez, biskupur, og leggur afturat, at bókin og filmurin eru talandi dømi um, at samfelagið hevur tørv á sambandi við heilagar maktir.